TVØROYRAR KOMMUNA

# STØRV SUM STUÐUL Í TVØROYRAR SKÚLA

Tvøroyrar skúli søkir eftir 2 fólkum til námsfrøðiligar stuðulstímar hjá næmingum við serligum tørvi.

- 1 starv 20 tímar um vikuna til næming í 5. flokki
- 1 starv 25 tímar um vikuna til næming í 6. flokki

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi leygardagin 9. august kl. 12.00.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjóran á telefon 371582.

**Tvøroyrar skúli**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Uppskot til býarskipan og byggisamtykt fyri Porkeris kommunu

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtyktir, seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til býarskipan og byggisamtykt fyri alla Porkeris kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 05.08.2008 til 26.08. 2008, allar gerandisdagar uttan leygardag, millum kl. 10.00 og 16.00.

Møguligt mótmæli móti uppskotinum skulu verða skrivlig og skulu verða bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi tann 03.11.2008 kl. 16.00.

*Porkeri, tann 18. juli 2008*

**Porkeris bygdarráð**

**Porkeris Kommuna**
**Við Á 8 · FO-950 Porkeri**
**Tlf. 37 36 03 · Fax 37 46 03**
**porkeri@porkeri.fo**

# Stuðul til Barnagarðin Eikilund í Vági og til Frítíðarskúlan í Vági

## (Endurlýsing)

Søkt verður eftir einum stuðli í tíðarmarkað starv til tvey børn í vøggustovualdri til Barnagarðin Eikilund í Vági frá 11. august 2008 til 1. juli 2009. Arbeiðið er 30 tímar um vikuna.

Somuleiðis verður søkt eftir einum stuðli í tíðarmarkað starv til Frítíðarskúlan í Vági til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi frá 18. august 2008 til 1. juli 2009. Arbeiðið er 20 tímar um vikuna.

Arbeiðið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

Stuðulin kemur í samstarvi við aðrar stuðlar og starvsfólk á stovninum og onnur fakfólk at stuðla børnunum at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag, umframt at kunna viðvirka í teimum tiltøkum, ið liggja uttan fyri stovnin.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara á tlf. 37 36 04 ella 22 67 04.

Umsóknin við prógvum, royndum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 18. august 2008 kl.15.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Runavíkar býráð

# Leiga av ítróttarhøllini í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2008/2009, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 17/08-2008.

**Runavíkar býráð**

Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

# Fysioterapeutur til Lágargarð

Røktar- og Umlættingarheimið Lágargarður lýsir eftir fysioterapeuti fyri okkara fysioterapeut, sum fer í farloyvi frá 1. september 2008 til 31. august 2009.

Arbeiðstíðin er 40 t/vikuna ella eftir avtalu

Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Fysioterapeutfelag Føroya.

Á Lágargarði eru 3 búeindir við 46 búplássum og 2 umlættingarplássum.

Harumframt er dagstovnur, har m.a. tilboð verður givið til fyribyrgjandi venjing hjá fysio- og ergoterapeuti, har uml. 30 heimabúgvandi pensionistar koma um vikuna.

**Krøv til starvið:**

- autorisatión sum fysiopeutur
- áhuga í at arbeiða innan eldraøkið
- góð samstarvsevni

**Innihaldið í starvinum:**

- fyribyrgjandi venjingar og viðlíkahaldsvenjingar til búfólk og heimabúgvandi pensionistar
- vegleiðing og upplæring av einstaka brúkaranum í nýtslu av hjálpartólum
- vegleiðing og upplæring av starvsfólki í nýtslu av hjálpartólum

Vekur hetta tín áhuga ella hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Marjun Poulsen, virkandi leiðara á dagstovninum, á tlf. 31 67 88.

Skrivlig umsókn til starvið við neyðugum prógvi og møguligum viðmæli skal sendast til:

Lágargarð
att. Meta av Fløtum
Stoffalág 84
Postboks 1188
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 15. august 2008.**

# Háskúlaskeiðið

**frá 18. august til 19. desember 2008**

**- ein spennandi og øðrvísi skúli.**

Set teg í samband við okkum og hoyr meira um skeiðið

**Føroya Fólkaháskúli**
Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn
tlf. 31 17 43
haskulin@haskulin.fo - www.haskulin.fo